## Kom og gakk

**Tiltakið Kom og Gakk verður aftur á skránni í ár Byrjað verður leygardagin, tá vit fara til gongu í Havnar gøtum**

11. juni skipar Kunningarstovan og Tórshavnar kommuna aftur fyri gongudegi. Vit hava øll gott av at ganga, antin vit ganga einsamøll ella saman við øðrum. Einki er sum at ganga ein túr í haganum ein góðveðursdag, men vit mugu ikki gloyma dag um dag at ganga túr eftir gøtum og vegum í býnum.

Vit vænta gott veður leygardagin, so kom oman á Vaglið og kom við út at ganga. Fimm ymiskir gongutúrar eru á skránni. Túrarnir eru millum 3,5 og 7 kilometrar til longdar. Allir túrar eru av Vaglinum og enda aftur á Vaglinum.

Vit byrja kl. 15 at hita upp í Gl. Kommunuskúlagarðinum og verða aftur uml. kl. 16.30. Tá strekkja vit út, fáa heiðursbræv, lurta eftir GHM og hava felagssang. Keypsamtøkan í Miðbýnum bjóðar gongufólkunum frukt eftir túrin.

Øll kunnu luttaka, ung og gomul, børn og vaksin, havnarborgarar og gestir í býnum, einstaklingar og bólkar, við stavi og uttan.. Tað ræður ikki um at ganga so langt og so skjótt sum møguligt, men bert um at ganga.

Eingin tilmelding er neyðug. Vit síggjast leygardagin kl. 15 - havi beinini við.

# Nýggjur fiskabilur í Vágsbotni

**Nú ber til hjá fólki at keypa sær fiskavørur úr einum nýmótans fiskabili á bryggjuni í Vágsbotn.**

FISKASELJARI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er AÍB Fisk, sum hevur ognað sær nýggja fiskabilin. AÍB Fisk stendur fyri Anker í Byrgi, sum hevur bilin, ið er gjørdur til at selja fisk úr.



*Anker í Byrgi framman fyri nýggja fiskabilin hjá sær í góðveðrinum í Vágsbotn fríggjamorgunin.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Stórur áhugi

Anker í Byrgi sigur, at hann keypti sær bilin fyri einum mánað síðani, og kassin (t.v.s. sjálvt húsið) hevur hann keypt í Grenå í Danmark.

Bilurin hevur kuldaanlegg, soleiðis at fiskurin heldur sær best møguligt, og úrvalið er breitt. Eitt nú ber til at keypa sær kalva, flak, lippur, kjálkar og mangt annað gott.

Anker í Byrgi sigur, at tað er rættuliga stórur áhugi fyri fiskavørunum, bæði millum føroyingar og útlendingar. Hann sigur, at nokk so fitt av føroyingum keypa frá honum, men tað eru eisini mong, ið bara koma at hyggja.

# Costa Allegra á Havnini

Fríggjamorgunin kom italska ferðamannaskipið Costa Allegra á Havnina. Costa Allegra er tað fyrsta av teimum størru ferðamannaskipunum, ið vitja á Havnini í summar. Tvey smærri ferðamannaskip hava verið á vitjan fyrr í ár. Umborð á Costa Allegra eru 800 ferðafólk, og tey flestu av teimum eru úr Italia og Fraklandi. Costa Allegra kom á Havnina klokkan hálvgum sjey fríggjamorgunin og fór avstað aftur um hálvgum fimmtíðina seinnapartin fríggjadagin.

**tn**



# Bjørgfríð nýggjur miðfyrisitingarstjóri

**Hóskvøldið avgjørdi Tórshavnar Býráð at seta Bjørgfríð Ludvig í starv sum fyrsta miðfyrisitingarstjóran hjá kommununi**

STARVSSETAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tórshavnar Býráð søkti eftir einum miðfyrisitingarstjóra í apríl mánað, og ikki kann sigast annað enn, at áhugin fyri starvinum var stórur. Ikki færri enn 20 fólk søktu starvið, og tað vóru hesar umsóknirnar, ið býráðið skuldi taka støðu til á afturlatnum býráðsfundi hóskvøldið.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur seg fegnast um, at so stórur áhugi var fyri starvinum, og hann sigur, at flestallir av teimum 20 umsøkjarunum vóru væl skikkaðir til starvið. Býráðið legði tó dent á, at tað var ein persónur við leiðsluroyndum, og sum hevði eina viðkomandi útbúgving, ið var settur í starvið.



*Bjørgfríð Ludvig úr Havn er sett í starv sum miðfyrisitingarstjóri hjá Tórshavnar Kommunu. Hon byrjar í starvinum 15. august*

### Útbúgvin innan fyrisiting

Valið fall, sum áðurnevnt, á Bjørgfríð Ludvig úr Havn. Bjørgfríð er 38 ára gomul, og hon hevur seinastu árini starvast í Vinnuhúsinum.

Hon er útbúgvin cand. scient. adm., ið er samfelagsvísindalig útbúgving við serligum denti á fyrisiting. Høvuðsuppgávan hjá nýggja miðfyrisitingarstjóranum verður at stjórna teimum økjum, ið hoyra til miðfyrisitingina og hava ábyrgdina av fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu stýringini innan hesi øki.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at tað liggur í bygnaðinum fyri Tórshavnar Kommunu, at ein miðfyrisitingarstjóri skuldi setast. Hann sigur, at tað hevur verið ætlanin at seta ein slíkan í fleiri ár, men tað er bara ongantíð sett í verk.

Borgarstjórin sigur, at setanin av miðfyrisitingarstjóranum er ein liður í at styrkja um miðfyrisitingina, og hann ivast ikki í, at tað fer at fáa nógv umsitingarlig ting upp á pláss, nú ein slíkur er settur.

Bjørgfríð Ludvig tekur við starvinum sum miðfyrisitingarstjóri tann 15. august.

## Glóðin er útkomin

Í vikuni kom útoyggjablaðið Glóðin aftur í sølubúðurnar kring landið. Talan er um sjeyndu útgávuna av blaðnum, og tað kemur út í sambandi við, at útoyggjastevna verður í Svínoy leygardagin.

Í blaðnum eru áhugaverdar greinar um eitt nú trupulleikar í Mykinesi, nú Sørvágs kommuna hevur avgerandi orðið í bygdini. Eisini er ein áhugaverd samrøða við ein kvinnuligan bónda í Hesti, og somuleiðis er frásøgn frá útoyggjastevnuni í Hesti í fjør.

**tn**